# Fundarfrágreiðing til HSF-limafundi sunnudagin 7. sep. 2025

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Heini Ellingsgaard, Kristian Østergaard, Durita Thomsen og Høgni Vilhelmsen fyri Starvsnevndina. Dánjal Samuelsen, dómaramennari. Ári Rouch, Pól Hendrikkur Andreassen, Hallur Danielsen, Mark Lausen-Marcher, Jens á Skipagøtu og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Tóra Seloy og Eyð Hansen fyri VÍF. Helena Dam á Neystabø, Liljan Weihe og Pætur Jakobsen fyri Neistan. Djóni Sivertsen og Annika Arge fyri Stjørnuna. Eyðun Mortensen, Heini Hellisdal Poulsen og Lars Black fyri Kyndil. Eyðun Joensen, Anna Dam og Emy Sólvitsdóttir fyri H71. Sólja Jóanisdóttir fyri SÍF/Søljuna. Malan Falkenberg og Rudi Olsen fyri ÍA. Anja Weyhe og Magnus Dansson fyri KÍF. Sunnuvá Eysturdal og Karstin Høghamar fyri EB. Egi Danielsen fyri StÍF. Jón Jacobsen fyri Team Klaksvík. Tóki Krosslá Mortensen fyri VB.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Innkomið mál, uppskot frá Kyndli í smb. við Burn deildina**
Hjalti Mohr Jacobsen legði fram vegna Kyndil. Víst var á, at liðini í bestu mansdeildini spæla ov fáar dystir samanborið við aðrar hondbóltstjóðir, og at ov nógv glopp vóru í kappingini, tá talan er um ólíkatal av liðum í kappingini. Fleiri dystir kemur at geva feløgunum betri møguleika at spæla breitt og lova fleiri leikarum framat. Tað var tó viðmerkt, at nógv bendir á, talan kann blíva um 8 lið í bestu manskappingini innan ikki so langa tíð, og at hetta vildi loyst ein part av umrødda trupulleika. Eisini kunnu fleiri dystir og ein longri kapping blíva ein avbjóðing fyri smærri feløgini, sum hava eitt minni leikaratilfeingi. Hugsanin um fleiri dystir og eina longda kapping var annars sum heild væl móttikin.

**1.1 Niðurstøða**
HSF-umsitingin skal koma við einum uppskoti til næsta limafund, sum vísir, hvussu ein kapping við 4 umførum í grundspælinum kann síggja út.

**2.0 Kunning um dómaraskeið og menningarátøk innan dómaraøkið, Dánjal Samuelsen**
Dánjal Samuelsen, sum er settur sum dómaramennari í HSF, greiddi frá nýggja leiklutinum hjá sær. Hartil yvirskipað um dómaraskeið, útbúgving og átøk í næstum.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini fáa kunning og innbjóðing til dómaraskeið á C- og B-stigi í næstum.

**3.0 Kappingin 2025/26 + endurskoðan av U8**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, tók álmanakkan fram og greiddi yvirskipað frá um tilgongdina til kappingarárið, sum stendur fyri durðum. Julian Johansen, U8-venjari hjá Kyndil, tók orðið víðvíkjandi ynski um at fáa fleiri U8-kappingarnar á skrá. Eisini var lagt fram ynski um at elstu U8-liðini heldur spæla á stuttvølli, heldur enn tvørvølli. Eisini var viðmerkt, at kappingarnar enda ov seint á kvøldi.

**3.1 Niðurstøða**
Semja var um, at HSF-umstingin saman við Menningar- og Úrvalsnevndini viðgerð møguligar broytingar í U8-skipanini og kunnar feløgini um møguligar broytingar seinni í inniverandi mánaði.

**4.0 Venjaraskeið 2025/26, Andrass Thomsen**
Andrass Thomsen, stjóri, greiddi frá um venjaraútbúgvingina og komandi venjaraskeið.

**4.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**5.0 Temadagur og vitjanir í feløgunum 2025/26**
Andrass Thomsen, stjóri, kunnaði um, at HSF hugsar at koma at vitja feløgini aftur í vetur. Hetta á sama hátt sum veturin 2023/24. Hartil fer HSF at skipa fyri einum felags temadegi í heyst fyri feløgunum við viðkomandi evnum.

**5.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kuningini gætur.

**6.0 Landsliðsvirksemi og leikaramenning 2025/26, Mark Lausen-Marcher**
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, greiddi frá álmanakkanum fyri landsliðsvirksemi og leikaramenning fyri 2025/26 og teimum uppgávum, sum føroyskum landsliðini hava fyri framman. Enn er ikki greitt, hvønn árgang European Open verður fyri, og er tískil ikki 100% greiði á øllum uppgávunum.

Mark legði eisini fram um arbeiði við virðisgrundalagi, sum HSF hevur arbeitt við. Skjalið eitur «Virðisgrundarlag fyri venjarar og leiðarar í ungdómsdeildunum hjá Hondbóltssambandi Føroya.» Talan er um virðisgrundarlag, sum feløgini eisini kunnu brúka í teirra feløgum, at avstemma í mun til teirra venjarar. Talan er um arbeiði, ið byggir á altjóða gransking.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kuningini gætur og kunnu fáa skajlið um virðisgrundarlag sendandi.

**7.0 Kunning um live.hsf.fo, Hallur Danielsen**
Hallur greiddi frá um live.hsf.fo. Skipanin hevði eitt yvirskot á 254,632, 49 kr. fyri kappingarárið 2024/25. HSF eigur 40% og feløgini 60% av skipanin og var býtið hareftir, har feløgini fáa 10.185,30 kr. fyri hvørt lið. Greiða skal fáast á avtaluna við Ø-media, sum hevur sagt hana upp. HSF vónar tó, at hon kann halda áfram kappignarárið 2025/26 út. Avtala er gjørd við Sjúrð Hoydal um at siga frá dystum vikuliga. Samband er eisini við KVF um samstarv um eina møguliga vikusending um føroyskan hondbólt.

Andrass greiddi eisini frá um Spiideo kamera (automatisk kameraskipan), sum er ein møguleiki, sum HSF er í ferð við at kanna.

Anna Dam (H71) viðmerkti í mun til European Cup dystir á live.hsf.fo, at feløgini ikki fingu nóg nógv burturúr hesum, hetta í mun til inntøkur og útreiðslur, tá HSF skal hava 40% av inntøkunum, meðan feløgini hava allar útreiðslurnar.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur. HSF ger eitt uppskot til leist, í mun til býti, tá talan er um Europa Cup dystir.

**8.0 Uppskot um felags atgongumerkjasølu + prísir**
Ári Rouch, umistingin, viðmerkti at feløgini á limafundi fyri nøkrum árum síðani hava samtykt, at feløgini kunnu taka 100 kr. fyri vaksin í atgongumerkjaprísi, tá talan er um hálvfinalur og finalur, bæði í steypakappingini og landskappingini. Kappingarleisturin er síðani broyttur við fjórðingsfinalum og bronsudystum, og feløguni hava tá spurt um tey kunnu taka 100 kr. eisini til hesar dystir. Hetta hevur ikki verið í trá við fundarsamtyktina. Ári legði tískil uppskotið fyri fundin, at feløgini í øllum dystum í endaspælinum, kunnu taka 100 fyri atgongumerkini fyri vaksin. Uppskotið var samtykt.

Andrass Thomsen, stjóri, legði eisini fram uppskot, hvørt HSF skuldi fara at kanna ella arbeiða við einari felags talgildari atgongumerkjaskipan. Hugsanin var, at hetta kundi geva feløgunum betri møguleikar at selja t.d. árskort og at sleppa undan sølu við dyrnar. Hartil vil hetta geva eitt ávíst hagtalsgrundalag í mun til áskoðaratøl og nær og hvussu dystir liggja best. Jón Jacobsen, Team Klaksvík, viðmerkti, at hann helt ikki at hetta var uppgávan hjá HSF, og at feløgini betri kundu skipa atgongumerkjasøluna sjálvi.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini samtyktu, at víkjast kann frá vanliga atgongumerkjaprísinum fyri vaksin á 70 kr., og kunnu tey taka 100 kr. fyri atgongumerkini fyri vaksin í øllum dystum í FM-endaspælinum, umframt fyri hálvfinalurnar í steypakappinigni. Viðvíkjandi uppskotinum um felags atgongumerkjasølu, so var eingin niðurstøða, men kann HSF arbeiða fram móti onkrum meira ítøkiligum.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch